Mai 2020

betri

# Akfar undir 3500 kg

**Hjá okkum kanst tú velja ta trygging, ið hóskar til tín tørv og títt akfar. Tú kanst tekna ábyrgdartrygging og skrokktrygging við ískoytum.**

**Ábyrgdartrygging**
Ábyrgdartrygging er lógarkravd trygging. Hon endurrindar skaða, sum bilurin ger á onnur og á ogn hjá øðrum. Tryggingin dekkar ikki skaðar, sum tú gert á egnan bil.

**Ískoytistrygging (ábyrgdartrygging)**
Er ábyrgdartrygging teknað kunnu niðanfyri ískoytis tryggingar teknast.

**Føraravanlukkutrygging**
Hetta er vanlukkutrygging, sum tryggjar teg sum bilførara, skuldi tú verið fyri ferðsluvanlukku. Ert tú í arbeiðið er tað fyrst Arbeiðsskaðatryggingin, sum er galdandi.

**Flutningstrygging**
Trygging fyri vørur, amboð v.m. hjá tær og hjá 3. manni, sum tú hevur í bilinum.

**Skrokktrygging**
Skrokktryggingin fevnir um:

**Skrokktrygging**
Endurgjald fyri skaðar, ið koma á sjálvan bilskrokkin, og fevnir um skaðar av øllum slag. Umfatar tó ikki skaða, sum bert kemur á mekaniskar og elektriskar lutir.

**Nývirðisendurgjald**
Nývirðisendurgjald er, at tú kanst keypa tær spildurnýggjan bil, um tín fær stóran skaða. Er bert galdandi fyri bilar, ið eru eitt ár ella yngri. Kostnaðurin fyri umvæling skal vera hægri enn 50% av nývirðinum.

Bilurin skal vera verksmiðjunýggjur, tá ið tryggingin varð teknað.

**Lyklafulnað**
Tryggingin veitir endurgjald, tá lykil til tryggjaða akfarið verður stolin ella mistur.

**Rættarhjálp**
Rættarhjálp er fíggjarligur stuðul til sakførarahjálp.

**Skeiv áfylling**
Skeiv áfylling veitir endurgjald, um tú hevur latið skeivt brennievni á bilin. Goldið verður fyri at tøma og reinsa brennievnistangan og fyri at fylla rætt brennievni á.

**Nummarplátustuldur**
Nummarplátustuldur veitir endurgjald, um nummarpláturnar á bili tínum verða stolnar.

**Ískoytistrygging (Skrokktrygging)**
Er skrokktrygging teknað kunnu niðanfyri ískoytistryggingar teknast.

**Serskaði**
Tryggingargjaldið hækkar ikki fyri serligir skaðar. Talan er t.d. um skaða av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðurslættri, omanlopi, stuldri, herverki og skaðar á glas.

Fyri skaða á glas er galdandi, at vit gjalda fult út tá talan er um umvæling av glasinum. Um glasið ikki kann umvælast er sjálvsábyrgdin kr. 1.500.

**Mekaniskur skaði**
Trygging kann teknast fyri skaða á mekaniskar og elektriskar lutir.

**Tiltaksakfar**
Hevur tú tørv á øðrum akfari ímeðan títt akfar er á verkstað vegna skaða, ið tryggingin fevnir um, kanst tú tekna trygging fyri leiguútreiðslur av øðrum akfari.

Tryggingin veitir endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur og endurgjald verður veitt frá 3. umvælingardegi og í mesta lagi kr. 15.000.

**Fíggjarmiss**
Endurgjald verður veitt frá 3. umvælingardegi og endurgjaldið er í mesta lagi kr. 15.000.

**Parkeringsskaði**
Fevnir um smáskaðar sum henda, meðan bilurin er parkeraður og tú ikki veit, hvør hevur gjørt skaðan.

Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald fyri Parkeringskaða, at bilurin ikki er eldri enn 5 ár frá fyrstu skráseting.

Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 15.000.

**Bilhjálp í Føroyum**
Veitir tær hjálp, tá tú av ávísum orsøkum steðgar upp ella kemur í óføri á føroyska vegakervinum.

Tað er ein treyt fyri at fáa Bilhjálp í Føroyum, at bilurin ikki er eldri enn 5 ár frá fyrstu skráseting. Ring til Betri Bilhjálp á tel 606060.

betri

# Akfar undir 3500 kg

**Hvussu verður tryggingin teknað**
Tryggingin verður teknað hjá Betri Trygging ella á bilasøluni.

Tú hevur møguleika fyri at tekna tryggingina beinleiðis á bilasøluni í sambandi við keypið av bilinum. Hetta er sera ómakaleyst fyri teg.

**Fá meira at vita**
Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.

**Betri Trygging**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
Tel 348 600
betri@trygging.fo
www.betritrygging.fo